*Framhald av síðu 6*

verður minni at býta.

## Givið skattalætta

- Hava tit í landsstýrinum ikki eisini sjálvir biðið um hetta, tá tit enn ikki hava megnað at fáa eina pensiónslóggávu, tit hava framt nógvar hækkingar av vanligum brúksvørum, tit hava hækkað sjónvarpsgjald osfr.?

- Vit hava givið heilt markantar skattalættar, sum hevur gjørt, at keypiorkan hjá føroyingum sum heild er munandi batnað tey seinnu árini. Vit kundu sjálvandi gjørt meira við tað. Men tað er so spurningurin, hvat tú fær meiriluta fyri. Tað ræður um at hava eina javnvág, so tú fær eitt størri avkast í tí og til tað føroyska samfelagið. Tað er ein hárfín ballansugongd.

Løgmaður vísir annars aftur kritikkinum um, at skattalættin ikki kemur teimum lægru inntøkunum nóg nógv til góða. -Ger tú upp í % í skattakrónum, so fáa láginntøkurnar munandi meira í lætta enn hátinntøkur. Men vit hava eina progressiva skattaskipan, sum ger, at láginntøkurnar hava væl minni av skatti enn tær høgu. Tú kanst ikki hava líka nógvar krónur á einum minni skattatrýsti enn einum stórum. Men verður skattalættin umroknaður til lønarhækkingar, so eru tað heilt munandi lønarhækkingar. Av hvørjari einastu krónu, sum kemur omaná lønarposan, fara eini 54-56 oyru fyrst og fremst í skatt, tí tað fer alt uppá marginalin. Men tað, sum er drepandi við tí, er, at tú oyðileggur kappingarførið fyri okkara útflutningsvørur, sum skal kappast við vørur úr øðrum londum.

## Pínumarkið!

- Nú verkfallið skjótt hevur verið í ein mánað, hvar er pínumarkið eftir tínum høvdi, har løgmaður fer inn og sigur: hertil og ikki longur?

- Eg vóni, at partarnir, sum hava henda rætt at samráðast eisini føla tað sum eina skyldu at koma til eina semju. Tríggjar vikur er alt alt ov long tíð at hava sitið bara og bíðað eftir hvørjum øðrum. Handlarnir at stongja, og tað verður bara ein spurningur um tíð, til tað er hungur og hall í hvørjum heimi í Føroyum – fyri ikki at tosa um ta veldþuga potentialið av inntøkum, sum hetta samfelagið kundi fingið frá fiskivinnuni. Vit hava sildafiskiskap í føroyskum sjógvi, vit hava svartkjaftaskip, sum liggja og bíða. Alt fer av landinum. Fyri hvønn dag sum gongur missa vit milliónir av krónum.

Løgmaður sigur at enda, at fakfeløgini, sum hava uppgávur, skyldur og rættindi á hesum økinum, sita nú bara afturá og bíða, tí tey vóna, at politikarar skulu loysa henda knútin. Men tað er avgjørt seinasti útvegur. Klára partarnir ikki at finna út av eini semju her og nú, og tað skal vera skjótt, so eru teir ikki sína uppgávu vaksnir og standa ikki mát til tær skyldur, sum samráðingarrætturin gevur teimum, og serliga samfelagsskyldur.

Løgmaður heldur tað annars verður stórt spell, um verkfallið fer at gera, at stórdysturin millum Føroyar og Týskaland ikki verður leiktur her heima. –Tað skuldi verið ein giltur møguleiki hjá tí føroyska samfelagnum, men sum nú kanska kann blíva tað størsta kaos av øllum. Verður tann dysturin avlýstur her og fluttur uttanlands, tá eru vit komin ov langt.


GSM telefonir

Nokia - Siemens - Motorola

Ericsson - Panasonic

Tráðleysar

Siemens Dect.

Kunnu ikki avlurtast

Til skip og bátar

NMT 450 - VHF telefonir v.m.

Storno

SØLA & TÆNASTA

Handan Á 6 - 100 Tórshavn

Tel. 314414 - Fax 318045


# HEILSANIR



**Góða Jóna Mikala**
Hjartaliga tillukku á føðingardegnum 2. mai og á konfirmatiónsdegnum 16. mai.
**Omman á Skála**



**Góða Súsanna og Símun**
Tillukku við døgunum 13. og 28. mai. Alt tað besta.
**Heilsan vit í Beiti 6**



**Góða fitta Mirandee**
Tillukku við 4 ára føðingardegnum. Eisini ein heilsa til mammu og pappa.
**Ynskja Sóley fastir og Martin**



**Góða ommudid**
Hjartaliga tillukku á 60 ára føðingardegnum 29. mai. Takk fyri at tú altíð ert so góð við okkum.
**Jaspur, Rúna, Malan, Bjørg, Sólrun, Hildur og Marjun**



**Góða Sunnva**
Hjartaliga tillukku við teimum 21 árunum 23. mai.
**Omman á Skála**



**Góði Sakaris**
Tillukku við 3 ára degnum í dag. Nú ert tú ordiliga stórur.
**Heilsan mostir og gubbin á Hólinum**



**Góði Bjartur**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum 2. juni. Nú ert tú blivin stórur.
**Ynskja beiggjarnir**



**Góði Bjartur**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum 2. juni. Jesus pápi signi teg.
**Ynskja mamma og babba**


## Big Foot til sølu



Toyota Landcruiser við stórum hjólum. Nýístandsettur og sproytaður.

Áhugað kunnu ringja **tlf. 333235.**




# TILTØK

**Leygarkvøldið 31. mai**
*Christianskirkjan:* kl. 19 Konsert v/ Midnatttskøren, Lund, Svøríki

**Gudstænsatur**
**6. sunnudag e. páskir**
*Haldarsvík:* kl. 11,
*Tjørnuvík:* kl. 12 Marjun Bæk
*Christianskirkjan:* kl. 11 Hans Eiler Hammer, útvarpað
*Klaksvíkar sjúkrahús*: kl. 10,
*Haraldssund:* kl. 12,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30 Niels Pauli Danielsen
*Gøta:* kl. 11 Martin R. Jacobsen
*Eiði:* kl. 11,
*Funningsfjørður:* kl. 16 John Myllhamar
*Fámjins kirkja:* kl. 12, altarg., Jónsvein Bech
*Porkeri:* kl. 12 Ólavur Rasmussen
*Vesturkirkjan:* kl. 11 Bergur D. Joensen, altarg.,
*Havnar kirkja:* kl. 11 Bjarni Bæk
*Norðskála:* kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 Messa Emil Olsen

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*upp á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Sunnudagsskúli kl. 14.

**Samkoman Rhema**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti í Rhema.
Sunnudagin 1. juni verður Familjumøti. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Kristian Davidsen.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Kvinnustevnan byrjar við møti fríggjadagin kl. 20.
Túrurin til Vágar byrjar leygardag kl. 10.
Sunnudagin privatmøti kl. 15.30. Almennir fundir vera sunnudag kl. 11 og 18. (drekkamunnur) major T. Gamst og oberstl. M. Berre leiða og tala. Heimaforbundið skipar fyri. Øll eru vælkomin.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er barnaansing. Kl. 11.30 er samvera við drekkamunni. Kl. 12 er sunnudagsskúli og møti, Richard Schwartsson talar. www.hebron.fo

**Adventkirkjan**
Í dag kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Virðing. Kl. 11 Gudstænasta J. V. Danielsen.

**KFUM og K í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman v/ Guttorm Zachariasen.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Bergur Skovgaard, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti í Evangeliihúsinum viðv. www.filadelfia.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið venur.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Eiler Johannesen.
Mánadagin kl. 20 Felags bønarmøti í Evangeliihúsinum fyri Hvítusunnustevnuni.
Telefonandaktin 4247641.

**Missiónshúsið Libanon í Sørvági**
Hvítusunnustevnan verður í døgunum 6.-9. juni. Talari á stevnuni verður Peter Tkaczyk. Øll, yngri sum eldri, eru hjartaliga vælkomin.

**Nesvík**
Felagsmissiónsvikan heldur áfram í kvøld við bønarmøti kl. 19 og møti kl. 19.30 við Niels Jacob Nielsen av Strondum, Taborkórið úr Fuglafirði syngur, innsavnan. Kl. 22.30 Eftirmøti við bønargongu og lovsangi, vitnisburður við Jóhannus Mikkelsen, Katrin, Beinta og Marjun syngja.
Sunnudagin kl. 15 Felags sunnudagsskúli/framiljumøti við luttøku av Glyvrum, Stranda Barnakór syngur, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Magnus Højgaard úr Rituvík, 2 ungdómsbólkar av Glyvrum syngja, innsavnan.

**Missiónshúsið í Gøtu**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við John S. Myllhamar, trúboðara.

**Keldan, Skálafirði**
Leygardagin kl. 17.30-19.30 junior 3.-7. fl. samlast fyri seinastu ferð áðrenn summarfrítíðina.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Bergur Skovgaard.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Jastrid Høj og Oddvør Jacobsen, Barnamøti kl. 17.
Mánakvøldið er felags bønarmøti í Evangeliihúsinum í Havn í samband við hvítusunnustevnuna. Bussur fer frá Kelduni kl. 19.10.
www.keldan.fo

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygardagin kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Gøta**
Týsdagin kl. 20 í Glyvra-Hanusars húsi, bibeltime v. Peter O. K. Olofson.

**Nebo, Toftir**
Á møtinum í kvøld kl. 20 luttekur Petur Hansen, trúboðari í Papua Nýguinea.

**Lívsins Orð**
Í kvøld kl. 20 verður filmurin »Left behind 2« vístur á stórskíggja.
Sunnudagin kl. 17 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 20 Fundur fyri Barnaleguna.
Sunnudagin ongin sunnudagsskúli, kl. 18 Lovsangsmøti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti við Bergur Skovgaard (biðið verður fyri sjúkum).
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti við André Matras. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K – Norðoyggjar**
Leygardagin kl. 21 Ungdómsmøti við Pól Jóhannesen, gospelkórið »Gleði« syngur.
Aftaná midnáttarløtuna í Vágstúni, opið hús við livandi tónleiki.
Sunnudagin kl. 15 Barnasangcafé, kl. 18 Møti við Knút Didriksen. Øll hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Innsavnan. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin fara børnini í kirkju. Kl. 18 Møti við Tom og Kára. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 í Café One Way Tvøroyri. Allar kvinnur eru hjartaliga vlkomnar.

**Sion Vágur**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Mánadag kl. 21 Bønarmøti. Frá kl. 21-23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Í kvøld kl. 20 Bøn- og lovsongsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti við Eddie Bech.

**Fámjins kirkja**
Ætlaðu mótini í kirkjuni um vikuskfiti eru fyribils útsett.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin 2. juni
Upplestur
Mikudagin 4. juni
Sangur og upplestur.
Heildagstúrur til Elduvíkar. 18. juni er ætlanin at fara ein dagstúr norðureftir. Vit leiga buss við okkum, og fara úr Skopun kl. 10.30. Síðani koyra vit norður til Elduvíkar, har vit eta døgurða í Lonini uml. kl. 1.203. Á veg suður aftur vitja vit útgrevsturin í Kvívík og onnur støð. Kostnaður fyri túrin íroknað ferðing og mat er kr. 250. Neyðugt er at melda seg til túrin í seinasta lagi 15. juni antin í Tilhaldinum ella á tlf. 361990. Tilhaldið fer í summarfrí 1. juli til 1. september.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 2. mai:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum. Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, telving, dart og onnur spøl. **Tilmelding til túrin mikudagin oman á Skálatrøð tlf. 316491**
*Týsdagin 3. juni:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Flemming og Benny Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Prát
*Mikudagin 4. juni:*
kl. 10-17 Opið hús
kl. 14.30 »Vitja fabrikkina hjá Østrøm« í dag handil hjá Valdemar Lutzen á Skálatrøð. Tilmelding.
*Hósdagin 5. juni:*
Grundlógardagur – stongt.
*Fríggjadagin 6. juni:*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eysturoyar Gongufelag**
Sunnudagin 1. juni verður gongutúrurin niðan á Malinsfjall á Viðoynni á skránni. Vit sigla av ferjuleguni í Leirvík kl. 9.30. Frá Klaksvík koyrir bussur til Viðareiðis. Frásøgumaður er Leivur Sørensen. Túrurin er miðal. Tilmelding á Kunningarstovuni í Saltangará tlf. 449 449 ella 211 449.

# BRÚDLEYP

Leygardagin 7. juni kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Ingunn Innerdahl Hansen, Skopun og Petur Petersen, Havn. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

Leygardagin 14. juni kl. 14.00 giftast í Rituvíkar kirkju Annfríð Eliasen, Leirvík og Jan Herman Hansen, Rituvík. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í veitsluna, biðjast vinarligast siga frá á tlf. 443252 ella 447622 í seinasta lagi 31. mai.

Leygardagin 14. juni kl. 16.00 giftast í Frelsunarherinum í Havn Jensia Højgaard Petersen, Tórshavn og Leon Svenningson Kjærbæk, Vágur. Brúdleypið verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í veitslu kunnu ringja á tlf. 315278, 269445 ella 373989 innan 4. juni.

Leygardagin 5. juli kl. 9.00 giftast í Ebenezer Randi Louisa Fjallsá og Rani Isaksen bæði úr Tórshavn. Brúdleypið verður hildið á Hotel Føroyum kl. 11.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 315941 ella 212628 í seinasta lagi 20. juni.

Leygardagin 5. juli kl. 16.00 giftast í Hósvíkar kirkju Súsanna Kelduberg og Hans Andrias Joensen, Hósvík. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 318541, 315638 ella 422102 innan 14. juni.

Leygardagin 5. juli kl. 15.00 giftast í Sjóvar kirkju Annelisa Berthelsen, Strendur og Jens Kirstian Rasmussen, Sandavágur. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 447166, 333569 ella 332350 í seinasta lagi 16. juni.

# SILVURBRÚDLEYP

Mánadagin 16. juni kunnu hjúnini Harriet og Sámal á Toftini, Toftir, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 21. juni kl. 19.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í veitsluna, verða biðin um at siga frá á tlf. 448349 ella 2567001 í seinasta lagi 7. juni


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 31.05. kl. 19[00]
Leygardagin 31.05. kl. 23[30]
Sunnudagin 01.06. kl. 18[30]
Sunnudagin 01.06. kl. 22[45]




Leygardagin 31.05. kl. 21[00]
Sunnudagin 01.06. kl. 20[15]




Leygardagin 31.05. kl. 23[00]
Sunnudagin 01.06. kl. 22[00]




Leygardagin 31.05. kl. 18[00]
Leygardagin 31.05. kl. 20[30]
Sunnudagin 01.06. kl. 19[30]

P BIO P
KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu